# *KVINNUR VIÐ VÓN*

## *Bønaráheitanir fyri apríl 2025*

### *avbjóðingar uttaneftir, ið ávirka kvinnur*

1. Harri, vek samvitskuna hjá politikkarum um allan heim at gera og útinna lógir móti teimum, sum fremja brotsverkið menniskjahandil. (Sálmur 82:4)
2. Gud, fíggjarliga støðan í Albania er orsøk til, at mong í yngra ættarliðinum rýma av landinum og ynskja at gerast flóttafólk í Týsklandi ella USA, heldur enn at verða verandi í heimlandinum. (Sálmur 37: 3-5)
3. Miskunnsami Faðir, síggj til tørvin hjá teimum mongu familjunum í Benin og um allan heim, ið eru heimleysar orsakað av kríggi og politiskum ófriði. (Sálmur 23:1)
4. Harri, lat tilflytarar í Bonaire finna góðar lívsmøguleikar og verða góðtiknar í samfelagnum, ið tey eru flutt til. (Hebrearabrævið 13:2)
5. Gud, leið og vegleið nýggja stýrið í Botswana í royndini at fáa skil í landinum og taka sær av álvarsmálum um mutur millum fyrrverandi leiðarar. (Dániel 2:21)
6. Faðir, nógv fólk úr Kambodja fara frá familjum sínum og arbeiða ólógliga í øðrum londum orsakað av fíggjarkreppu og arbeiðsloysi í heimlandinum. Hjálp teimum at finna arbeiði. (5. Mósebók 24:14)
7. Harri, reis upp trúgvandi kristin í Kanada, sum kunnu taka sær av trúartænastuni millum flóttafólk til at hjálpa kvinnuligum flóttafólkum í ótryggum umstøðum og øðrum illa støddum fólkum, sum seta búgv har. (5. Mósebók 10:18-19)
8. Harri, í náði Tíni bein burtur alt mutur í stjórnini í Miðafrikanska Lýðveldinum, ið elvir til vónbrot fyri fólkið. (5. Mósebók 16:19)
9. Faðir, í Kina er ikki nóg mikið av hóskandi lendi til at velta fyri at breyðføða fólkið. Gev leiðarunum vísdóm til at gera sær greitt, hvussu teir kunnu tryggja fólkinum mat. (Orðtøkini 2:6)
10. Vit bera fram fyri Teg, Faðir, støðuna í Ísrael og Gaza, og biðja Teg um at fáa frið í lag í økinum. Veit øllum teimum óseku grøðing og mat frá Tær, og bjarga teimum frá at verða týnd. (Jóhannes 16:33)
11. Kongurin í Eswatini hevur viðurkent, at stóra fátækdømi og arbeiðsloysi, ið er 35,4%, elvir til kreppustøðu í landinum. Gev leiðarunum vísdóm, Harri, at fáa til vega arbeiðspláss og bjóða førleikavenjing. (Jákupsbræv 1:5)
12. Gud, gev *Kvinnur við Vón* toymunum í Ukraina og Russlandi styrki og vísdóm at gera stimbrandi, uggandi og upplýsandi sendingar til lurtarar, ið líða undir tí áhaldandi krígnum. (5. Mósebók 31:8)
13. Himmalski Faðir, vit biðja Teg fyri fólkinum í Indonesia í hesum tíðum við ógvisligum ódnarveðri, at Tú vilt verja tey, og veita teimum trygg skýli, sum búgva í økjum, ið tíðum verða rakt av náttúruvanlukku. (Sálmur 31:3 – ensk: 31:2)
14. Nú fólkatalið í Japan minkar, og fólk gerast eldri, er stígur komin í búskapin. Harri , ger at fólkið vendir sær til Tín fyri at greiða hesar trupulleikar. (Sálmur 105:4)
15. Faðir, vit biðja Teg um, at tey kristnu trúgvandi í Suðurkorea gerast meiri ágrýtin at bera evangeliska boðskapin til tær 2.5 milliónirnar av útlendingum, sum búgva í landinum. (Markus 16:15)

16. Vit biðja, Harri, at ein endi má fáast á órættvísum arbeiðsmannagongdum í Liberia. Lat fólkið fáa ágóðan av sínum arbeiði og fáa rættvísa løn, so tey kunnu fáa nóg mikið til dagligt breyð. (Prædikarin 3:13)
17. Faðir, verj gøtubørnini í Mali frá øllum teimum vandum, ið teimum er fyri, tá ið tey bidda fyri at yvirliva. Før vaksin menniskju inn í teirra lív, sum kunnu taka sær av teimum og breyðføða tey. (Orðtøkini 31:8-9)
18. Harri, vit biðja Teg um at reinsa stjórnina í Mongolia fyri mutur. Lat leiðararnar bera seg rættvíst at við virðing fyri Tær og leiða tjóðina í friði. (Mika 6:8)
19. Harri, vit biðja, at ein endi má fáast á yvirganginum í Myanmar. Lat leiðararnar og íbúgvarnar hava ein vilja at samrøða, ið kann føra til frið, sátt og semju fyri øll samfeløg. (1. Korintbræv 1:10)
20. Faðir, lat trúføstu nærveru Tína styrkja hjørtu og sinni á konum, sum stúra, tí menn teirra eru burturstaddir í kríggi. (Sálmur 55:23 – ensk: 55:22)
21. Faðir, gev leiðarum í nigeriansku stjórnini vísdóm og skapandi evni at reka politikk, ið kann linna um fátækdømi og ótryggleika. (Orðtøkini 21:1)
22. Harri, styrk og signa trúboðarar, sum ferðast til Norður Kaukasus at bera evangeliska boðskapin til fólkið har. (Matteus 28:19)
23. Harri, vegleið leiðararnar í Papua Ný Guinea, sum eru í ferð við at bøta um kloakkviðurskiftini í landinum. Lat hesar ábøtur minka um sjúkur og bøta um heilsuna hjá landsins íbúgvum. (3. Jóhannesarbræv 1:2)
24. Gud, lat munadygg hjálpar- og trygdarnet verða sett í verk í Paraguai, ið kunnu økja um møguleikarnar hjá kvinnum í fátækdømi at hava støðuga inntøku og framgongd. (Matteus 5:42)
25. Faðir, drag hjørtuni á religiøst víðgongdum fólkum og antisemittum til Tín. Gev børnum Tínum mót og dirvi at svara aftur við evangeliska boðskapinum í kærleika og sannleika, bæði í orði og verki, tá ið tey verða møtt við illvilja. (Jóhannes 6:44)
26. Vit biðja Harri, at fáa til vega verkætlanir og samstarv við fyritøkur, sum kunnu gera fátækar kvinnur í Suðurafrika førar fyri at fáa støðuga inntøku. (Orðtøkini 19:17)
27. Alveldis Gud, vit biðja fyri systrum okkara í Nyyarugusu flóttaleguni í Tansania, sum lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum. Nøkta tørv teirra á Bíblium, útvarpstólum og seymimaskinum. (Filippibrævið 4:6)
28. Harri, lat búskapin á Timor-Leste koma í fasta legu og hava framgongd. Gev leiðarum landsins vísdóm at fáa til vega arbeiðsmøguleikar, minka um fátækdømi og tryggja fólkinum mat. (Jeremias 29:11)
29. Faðir í Himli , miskunna teimum í Uruguai, sum eru skadd av náttúruvanlukkum, og hava mist síni kæru og sínar ognir. (Job 1:21-22)
30. Harri, margfalda hjálpina til Vietnam, nú farast skal undir endurbygging, eftir at stóra melduródnin Yagi legði nógvar partar í oyði. Gev fólkinum styrki og vón, sum tey eru í ferð við at endurbyggja sítt lív og samfelagið. (2. Korintbræv 9:8)

***"Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,***

***so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!"***

***Hebrearabrævið 4:16***

**Eeva Vähäsarja*: ”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”***

# *At økja um vón í Meksiko*

**Eftir Lula Vieyra, samskipara í Meksiko**

Kvinnur eru grundsúlur í uppbyggingini av meksikanska samfelagnum. Mong hava arbeitt hart fyri at tryggja framstig viðvíkjandi kvinnurættindum og –møguleikum, kortini møta kvinnur her framvegis avbjóðingum og forðingum, ið avmarka fullu menningini.

Útbúgving er grundararstøðið fyri persónligu og yrkisligu menningini hjá kvinnum. Hóast týðandi framstig hava verið gjørd, so at kvinnur kunnu fara undir skúlagongd, so eru hagtølini fyri tey, sum gevast, ein avbjóðing, serstakliga í bygdasamfeløgum og í samfeløgum við upprunafólki. Vit biðja, at Gud vil geva víðskygni, styrki og áhaldni at búgva út og venja einstøku kvinnurnar við tí endamáli, at tær kunnu nýta síni evni at tæna og náa fleiri kvinnur í samfelagi teirra.

Vit hava sæð kraft Guds, hvat ið heilsuni hjá kvinnum viðvíkur. Gjøgnum TWR *Kvinnur við Vón* ynskja vit at tosa við kvinnur um vón og minna tær á, at Gud hevur áhugað í øllum viðurskiftum í lívi teirra – bæði likamliga, sinnisliga, kensluliga og andaliga – uttan mun til bústaðarligu ella sosialfíggjarligu støðu teirra. Av tí at Gud hevur umsorgan og virðir okkum, sum vit eru, ynskir Hann, at vit hava samfelag við Hann, og at vit fara væl við likami okkara.

Kynsligur harðskapur er framvegis ein stórur trupulleiki í Meksiko. Hagtøl hjá stjórnini vísa, at heilt nógvar kvinnur hava gjøgnum lívið upplivað okkurt slag av harðskapi. Vit takka Gudi fyri, at Hann er tann, ið virðir og varðar kvinnur, og veitir teimum frælsi. Og við Heilaga Andanum, Orði Guds og samfelagi Kristusar kunnu kvinnur, hvørs lív er illa farið av skelkandi og syndafullum atburði, finna grøðing og endurreisn.

Tað arbeiðið, ið kvinnur gera í heimum sínum við at taka sær av familjuni og neyðugu, dagligu arbeiðssetningunum, er sera týdningarmikið fyri samfelagið og tess trivnaði. Tíverri er hetta virksemi sjáldan roknað sum veruligt arbeiði. Harafturat eru avbjóðingar hjá kvinnum á arbeiðsplássum í sambandi við løn og atgongd til hægri størv. Vit biðja fyri eini broyting í mentan og hugburði á øllum hesum økjum.

Nú farið verður undir TWR *Kvinnur við Vón* í Meksiko, royna vit at hjálpa kvinnum at fáa eitt livandi og økt samfelag við Gud, sum vit leiða tær í bøn og læra tær Guds Orð. Mátti tað givið kvinnum frælsi og verið við til at broytt mentanina, so tær kunnu liva fult upp til tað, sum Gud upprunaliga ætlaði teimum.

**Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva**

*KVINNUR VIÐ VÓN*

*twrwomenofhope.org*

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**